SAMHALDSFASTI
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin



# ÁRSFRÁGREIÐING 2019

Um grunnin 2
Inngjald 2
Útgjald 3
Fæið 4
Fyrisiting 5
Framtíðarútlit 6
Leiðsluátekning 7
Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara 8
Upplýsingar um grunnin 11
Nýttur roknskaparháttur 12
Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2019 15
Fíggjarstøða tann 31. desember 2019 16
Fíggjarstøða tann 31. desember 2019 17
Notur til ársfrásøgnina 18

## Um grunnin

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 við seinni broytingum. Endamálið við grunninum er at tryggja øllum íbúgvum í Føroyum eina arbeiðsmarknaðareftirløn.

Eitt stýri við trimum limum fyrisitur Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Stýrislimirnir eru valdir fyri trý ár í senn. Formaður í grunninum er, sambært lóg, stjórin í Landsbanka Føroya, harafturat er eitt umboð fyri løntakararnar og eitt umboð fyri arbeiðsgevararnar. Núverandi stýrislimir vórðu valdir 1. apríl 2019. Tey eru:

- Malan Johansen, forkvinna
- Marita V. Rasmussen, umboðar arbeiðsgevarar
- Georg F. Hansen, umboðar arbeiðstakarar

Í 2019 hevur stýrið havt fýra stýrisfundir. Stýrið fylgir við avkastinum av fænum og umrøður hetta á hvørjum fundi. Einaferð um árið gjøgnumgongur stýrið eisini íløgur og váðar nágreiniliga. Á fundinum í mai viðgjørdi stýrið roknskapin og í september varð avgerð tikin um útgjaldið fyri 2020.

## Inngjald

Fæið í Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum kemur av, at allir persónar undir 67 ár og allir arbeiðsgevarar rinda inn í grunnin. Sambært lógini fyri grunnin umsitir TAKS inngjøld í grunnin.

Inngjaldið frá persónum er eitt prosenttal av árligu skattskyldugu inntøkuni. Arbeiðsgevarar rinda eitt prosenttal av útgoldnum A-inntøkum.

Talva 1 vísir, hvat inngjaldið hevur verið í prosent av lønini síðan grunnurin varð settur á stovn. Inngjaldið er hækkað fleiri ferðir, og frá 2019 er tað 3%. Munur hevur tó ongantíð verið millum inngjaldið hjá arbeiðstakarum og arbeiðsgevarum.

| Ár | Inngjald arbeiðs-gevarar | Inngjald løntakarar |
|---|---|---|
| 1992-2004 | 0,50% | 0,50% |
| 2005 | 0,75% | 0,75% |
| 2006 | 1,00% | 1,00% |
| 2007 | 1,50% | 1,50% |
| 2008-2015 | 1,75% | 1,75% |
| 2016 | 2,25% | 2,25% |
| 2017 | 2,25% | 2,25% |
| 2018 | 2,50% | 2,50% |
| 2019- | 3,00% | 3,00% |

*Talva 1 - Inngjaldsprosent í AMEG*

Talva 2 vísir inngjøld tilsamans frá løntakarum og arbeiðsgevarum í krónum síðan 2005. Inngjøldini í 2019 vóru tilsamans 625 mió. kr., sum er 27% hægri enn fyri árið fyri. Hetta kemur millum annað av, at inngjaldsprosentið var hækkað úr 2,50% til 3,00% frá 2018 til 2019, sí Talva 1.

# Útgjald

Regluligar útgjaldingar til pensjónistar úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum byrjaðu 1. apríl 1997. Grunnurin hevur, sambært heimild í lóggávuni, gjørt avtalu við TAKS um, at TAKS umsitir útgjaldingarnar úr grunninum.

Talva 2 vísir, at samlaða útgjaldið í 2019 var 568 mió. kr., sum er munandi meira enn fyri 2018. At avgjaldið hækkar so nógv kemur eisini av, at inngjaldið hækkaði frá 2018 til 2019.

Talva 3 vísir mánaðarliga útgjaldið til ein pensjónist frá 1997 til 2020. Útgjaldið er vaksið úr 500 kr. um mánaðin upp í 5.740 kr. um mánaðin í 2020. 5.740 kr. svarar til fult útgjald. Fyri pensjónistar búsitandi í Føroyum er kravið, at tey hava búð í minsta lagi 15 ár í Føroyum frá 15 ára aldri til pensjónsaldur.

Fyri pensjónistar búsitandi uttanlands er kravið, at tey hava búð í minsta lagi 40 ár í Føroyum millum 15 ár og pensjónsaldur.

| Ár | Inngjøld í mió. kr. | Útgjøld í mió. kr. |
|---|---|---|
| 2005 | 96 | 63 |
| 2006 | 136 | 82 |
| 2007 | 218 | 126 |
| 2008 | 258 | 158 |
| 2009 | 252 | 183 |
| 2010 | 255 | 200 |
| 2011 | 262 | 215 |
| 2012 | 269 | 227 |
| 2013 | 276 | 239 |
| 2014 | 287 | 253 |
| 2015 | 304 | 268 |
| 2016 | 403 | 356 |
| 2017 | 429 | 384 |
| 2018 | 493 | 449 |
| 2019 | 625 | 568 |

*Talva 2 – Inngjøld og útgjøld AMEG*

Tey, sum ikki uppfylla kravið um fult útgjald, kunnu kortini hava rætt til brotpensjón. Fyri pensjónistar búsitandi uttanlands er kravið, at tey hava búð í Føroyum í minst trý ár millum 15 ára aldur og pensjónsaldur. Í hesum føri fær pensjónisturin 1/40 av fullum útgjaldið, fyri hvørt árið hann hevur búð í Føroyum, tó í mesta lagi 40 ár. Býr hann í Føroyum, fær hann 1/15 av fullum útgjaldið fyri hvørt árið hann hevur búð í Føroyum, tó í mesta lagi 15 ár.

9378 pensjónistar fingu útgjald úr grunninum í 2019. Av teimum búðu 938 uttanlands. 816 fingu brotpensjón og av hesum búðu 780 uttanlands.

## Fæið

Inngjaldið í grunnin tilsamans er størri enn útgjaldið (sí talvu 2). Til dømis vóru inngjøldini í 2019 57 mió. kr. hægri enn útgjøldini, tað vil siga at henda upphæddin var afturhildin í grunninum. Orsøkin til, at pengar vera afturhildnir er, at talið av pensjónistum fer at vaksa næstu árini. Í løtuni eru um 8.000 pensjónistar í Føroyum, men talið verður væntandi 11.000 pensjónistar í 2030'unum.

| Ár | Upphædd | Ár | Upphædd |
|---|---|---|---|
| **1997** | 500 | **2009** | 2.500 |
| **1998** | 525 | **2010** | 2.600 |
| **1999** | 560 | **2011** | 2.690 |
| **2000** | 595 | **2012** | 2.770 |
| **2001** | 620 | **2013** | 2.850 |
| **2002** | 650 | **2014** | 2.930 |
| **2003** | 680 | **2015** | 3.010 |
| **2004** | 700 | **2016** | 3.910 |
| **2005** | 910 | **2017** | 4.065 |
| **2006** | 1.185 | **2018** | 4.545 |
| **2007** | 1.860 | **2019** | 5.590 |
| **2008** | 2.230 | **2020** | 5.740 |

*Talva 3 – Yvirlit yvir mánaðarligt útgjald*

Fyri at sleppa undan at lækka mánaðarliga útgjaldið er tí neyðugt at spara upp til vaksandi talið av pensjónistum.

Burtursæð frá tøka gjaldførinum til dagliga raksturin, er øll fíggjarognin sett í virðisbrøv. Fæið verður røkt eftir íløguheimild frá stýrinum. Íløguheimildin svarar til kunngerðina um røkt av fænum.

Ein góður helmingur, 53,6% av allari virðisbrævaognini var sett í donsk stat- og realkreditlánsbrøv. Hin parturin av íløgum í lánsbrøv, umleið 11%, var sett í altjóða virkislánsbrøv og í lánsbrøv í menningarlondum. Partabrøvini vóru umleið 24% av ognini, meðan útlán og íløgur í alternativ vóru um 11%. Øll hesi tølini er miðal fyri árið.

Talva 4 vísir avkastið hjá grunnunum síðani 2012. Talvan vísir, at miðal árliga avkastið av fænum síðani 2012 er 3,84%. Í krónum hevur miðalavkastið verið knappar 42,9 mió. kr.

| Ár | Avkast | Mió. kr. | **2016** | 3,83% | 44,1 |
|---|---|---|---|---|---|
| **2012** | 4,52% | 38,7 | **2017** | 4,43% | 54,8 |
| **2013** | 2,70% | 25,9 | **2018** | -1,49% | -19,6 |
| **2014** | 4,66% | 47,5 | **2019** | 8,54% | 113,3 |
| **2015** | 3,53% | 38,5 | **Miðal** | **3,84%** | **42,9** |

*Talva 4 – Ársavkast síðstu árini*

Virðisbrævakursir (partabrøv, lánsbrøv, kreditlánsbrøv v.m.) sveiggja hvønn dag. Kursurin er virðið á virðisbrævinum og hækkar kursurin, merkir tað, at grunnurin fær meira fyri virðisbrævið, um ella tá ið tað verður selt – minkar kursurin fær grunnurin minni.

Í 2019 hevur fíggjarmarknaðurin verið merktur av ivamálum, eitt nú um Bretland skal úr ES við ella uttan eina avtalu. Handilsstríðið millum Kina og USA hevur eisini merkt marknaðin. Lagaligi pengapolitikkurin hjá miðbankum hevur elvt til lágt avkast av lánsbrøvum, men hevur hinvegin havt størri eftirspurning og harvið eisini høgan kurs á partabrøvum við sær.

Í talvu 5 sæst avkastið av ymsu virðisbrøvunum, sum íløga er gjørt í. Hægsta avkastið er komið av íløgunum í partabrøv, ímeðan tey minnu váðafúsu virðisbrøvini, so sum statslánsbrøv, hava givið lægri avkast.

## Fyrisiting

Avtala er gjørd um, at Landsbanki Føroya umsitir Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Umframt at røkja fæið hjá grunninum tekur Landsbankin sær av øllum tí fyrisitingarliga uttan tó at krevja inn inngjaldið og at rinda útgjaldið, sum TAKS tekur sær av.

| | Miðal íløga mió. kr. | Avkast mió kr. | Avkast % | Býtið % |
|---|---|---|---|---|
| Partabrøv | 319,5 | 94,3 | 29,5 | 24,1 |
| Statslánsbrøv | 22,0 | 0,2 | 1,1 | 1,7 |
| Realkreditt-lánsbrøv | 685,1 | 1,8 | 0,3 | 51,7 |
| Kredittlánsbrøv IG | 35,4 | 2,5 | 7,2 | 2,7 |
| Hárentulánsbrøv | 99,6 | 10,5 | 10,5 | 7,5 |
| Alternativar íløgur | 84,6 | 2,4 | 2,8 | 6,3 |
| Útlán | 64,5 | 1,7 | 2,6 | 4,9 |
| Innlán | 15,4 | -0,6 | -0,6 | 0,4 |
| **Íløgur tilsamans** | **1.326,1** | **113,2** | **8,5** | **100,0** |

*Talva 5 – Avkast býtt á aktivklassar*

Grunnurin hevur frá 1. januar 2019 íløgurøktaravtalu við Nordea, Handelsbankan, Nykredit og SEB.

Í 2019 hevur verið arbeitt við at umleggja myndilin at rokna útgjald úr grunninum inn í forritið R. Tað gevur stýrinum lættari atgongd at síggja, hvussu broytingar í ymisku fortreytunum fyri útrokningarnar, kunnu broyta uppá fíggjarstøðuna hjá grunninum. Ætlanin er framhaldandi at menna myndilin.

Annað mál, sum eisini hevur fylt nakað í 2019 og her í byrjanini av 2020, er broytingin í lógini um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, har undantak kann verða givið at rinda inn í grunnin, um viðkomandi, sum søkir, hevur rætt til hetta sambært Nordisku Konventiónini.

## Framtíðarútlit

Árið byrjaði við somu góðu gongd sum 2019 endaði við. Marknaðirnir vóru jaligir og váðafýsni var framvegis til staðar. Bæði partabrøv og lánsbrøv góðu góð avkast líka til avleiðingarnar av korona smittuni rakti marknaðin í februar. Síðani tá eru samfelagsbúskaparligu fyritreytirnar broyttar grundleggjandi.

Serliga partabrøvini eru fallin nógv í virði. Síðstu dagarnir í mars vendi gongdin og um miðjan mai er helvtina av fallinum vunnin inn aftur men fíggjarmarknaðurin sveiggjar nógv alla tíðina, og enn er nakað eftir at røkka sama støðið sum við ársbyrjan.

Óvissan er enn stór. Hvussu leingi verður heimsbúskapurin merktur av korona? Verður tíðarskeiðið stutt, er sannlíkt at búskapurin kemur skjótt fyri seg aftur. Dregur tað út, eru útlitini ikki so bjartskygd.

## Leiðsluátekning

Stýrið hevur í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019 fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ársroknskaparlógina.

Vit meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu felagsins tann 31. desember 2019 umframt av felagsins virksemi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019.

Vit meta, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenningar á stýrisfundinum.

Argir, tann 28. mai 2020

**Nevnd**

Malan Johansen
forkvinna

Marita V. Rasmussen

Georg F. Hansen

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

***Til nevndina í Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum***

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2019 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Áherðsla á viðurskifti í roknskapinum**

Í notu 1 í ársroknskapinum, verður víst til ta ávirkan COVID-19 kann fáa á grunnin. Tað er ikki møguligt at gera endaligu avleiðingarnar upp í løtuni. Okkara niðurstøða er ikki broytt orsakað av hesum.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

**Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum**

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, ætlað dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt felagið megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at felagið ikki er ført fyri at halda fram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 28. mai 2020

NUMO
Góðkent grannskoðanarvirki Sp/f

Súni Schwartz Jacobsen
statsaut. revisor

# Upplýsingar um grunnin

| | |
|---|---|
| **Grunnurin** | Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin<br>C/O Landsbanki Føroya<br>Kvíggjartún 1<br>FO-160 Argir<br><br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Malan Johansen, *forkvinna*<br>Marita V. Rasmussen<br>Georg F. Hansen |
| **Grannskoðan** | NUMO<br>Góðkent grannskoðanarvirki Sp/f<br>Smyrilsvegur 20<br>100 Tórshavn |
| **Ársaðalfundur** | Ársaðalfundur verður hildin eftir nærri áseting. |

# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum fyri 2019 er gjørd í samsvari við góðan roknskaparsið og sambært §§ 13 - 15 í stýrisskipanini fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

Ársfrásøgnin fyri 2019 er gjørd í donskum krónum.

**Um innrokning og virðisáseting**

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Harumframt verða virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum innroknaðar. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognini kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skylduni kann gerast upp álítandi.

Til at byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum lýst niðanfyri fyri einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprís og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

## Rakstrarroknskapurin

**Nettoinntøka**

Inntøka grunsins - arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið - er fyri løntakarar gjørt upp sum 3% (2018: 2,5%) av árligu skattskyldugu inntøkuni sambært fyribilsskattaskránni, umframt javningar av inngjøldum undanfarin ár.

Við roknskaparlok er ikki gjørligt at gera upp inntøkurnar fyri roknskaparárið endaliga, tí grundarlagið undir inntøkunum ikki er tøkt, við tað at sjálvuppgávurnar hjá persónum, sum inntøkurnar verða uppgjørdar eftir, ikki eru tøkar.

Hesar uppgerðir verða tí gjørdar í eftirfylgjandi roknskaparári. Broytingarnar eru tó ikki av eini tílíkari støðd, at tær hava týðandi ávirkan á ársfásøgnina.

Fyri arbeiðsgevarar er eftirlønargjaldið gjørt upp sum 3% (2018: 2,5%) av árligu útgoldnu A-inntøkuni.

### Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn

Kostnaðurin fyri arbeiðsmarknaðareftirløn er lógarbundna útgjaldingin til pensjónistar í roknskaparárinum.

### Samsýningar

Starvsfólkakostnaður fevnir um lønir, íroknað frítíðarløn og eftirlønir umframt aðrar kostnaðir til sosiala trygd v.m. til starvsfólk felagsins. Móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum eru drigin frá starvsfólkakostnaðinum.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir fevna um kostnaðir til fyrisiting, útreiðslur til umsiting av ognum grunsins, umframt annan kostnað.

### Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentur, kursvinning og -tap viðvíkjandi virðisbrøvum, skuld og flytingar í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum.

### Skattur av ársúrslitinum

Eins og undanfarin ár er ikki roknað við skatti í roknskapinum. Grunnurin er í gongd við at kanna, hvørt Grunnurin er skattskyldugur av avkastinum av íløgurøktini ella ikki.

## Fíggjarstøðan

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís.

Niðurskriving verður gjørd móti væntaðum tapi, tá ið tað verður mett at vera ein óvildug ábending um, at ein áogn ella áognarbólkur eru minkað í virði. Er ein óvildug ábending um, at ein einstøk áogn er virðisminkað, verður henda áogn niðurskrivað.

## Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, ið eru innroknaðar sum ogn í umferð, fevna um goldnar kostnaðir viðvíkjandi komandi roknskaparárum.

## Virðisbrøv og kapitalpartar

Virðisbrøv og kapitalpartar, ið fevna um børsskrásett partabrøv og lánsbrøv, verða virðisásett til dagsvirði fíggjarstøðudagin. Ikki børsskrásett virðisbrøv verða virðisásett til dagsvirði grundað á eitt roknað kapitalvirði.

## Tøkur peningur

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv við eini gildistíð minni enn 3 mánaðir og sum uttan forðing kunnu vekslast til tøkan pening, og har vandin fyri virðisbroytingum er ótýðandi.

## Skyldur

Skyldur verða virðisásettar til nettorealisationsvirði.

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2019

| | Nota | 2019 kr. | 2018 tkr. |
|---|---|---|---|
| **Nettoinntøka** | 2 | **624.700.974** | **492.929** |
| Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn | | -568.418.726 | -449.378 |
| Aðrir uttanhýsis kostnaðir | | -3.901.228 | -3.177 |
| **Bruttoúrslit** | | **52.381.020** | **40.374** |
| Samsýningar | 3 | -265.950 | -226 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **52.115.070** | **40.148** |
| Fíggjarligar inntøkur | 4 | 113.534.935 | -19.376 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **165.650.005** | **20.772** |
| Skattur av ársúrslitinum | | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | | **165.650.005** | **20.772** |
| Flutt úrslit | | 165.650.005 | 20.772 |
| | | **165.650.005** | **20.772** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2019

| | Nota | 2019 kr. | 2018 tkr. |
|---|---|---|---|
| **Ogn** | | | |
| Áogn av sølu og tænastum | | 78.090.224 | 65.970 |
| Tíðaravmarkingar | | 49.260.716 | 46.955 |
| **Áogn** | | **127.350.940** | **112.925** |
| Virðisbrøv | 5 | 1.436.174.623 | 1.231.481 |
| **Virðisbrøv** | | **1.436.174.623** | **1.231.481** |
| **Tøkur peningur** | | **12.279.267** | **65.874** |
| **Ogn í umferð til samans** | | **1.575.804.830** | **1.410.280** |
| **Ogn til samans** | | **1.575.804.830** | **1.410.280** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2019

| | Nota | 2019 kr. | 2018 tkr. |
|---|---|---|---|
| **Skyldur** | | | |
| Fluttur vinningur | | 1.575.088.561 | 1.409.439 |
| **Eginogn** | 6 | **1.575.088.561** | **1.409.439** |
| Vøru- og tænastuskuld | | 2.726 | 23 |
| Onnur skuld | | 713.543 | 0 |
| Tíðaravmarkingar | | 0 | 818 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **716.269** | **841** |
| **Skuld til samans** | | **716.269** | **841** |
| **Skyldur til samans** | | **1.575.804.830** | **1.410.280** |
| Hendingar eftir roknskaparárslok | 1 | | |
| Eventualskyldur v.m. | 7 | | |
| Veðsetingar og trygdarveitingar | 8 | | |

# Notur til ársfrásøgnina

## 1 Hendingar eftir roknskaparárslok

Tann skjóta spreiðingin av COVID19 í Føroyum og í umheiminum í mars 2020 hevur gjørt tað neyðugt hjá myndugleikunum at seta í verk fleiri avmarkingar, sum kunnu fáa stóra samfelagsliga ávirkan. Um farsóttin fer at vara leingi, og myndugleikarnir møguliga fremja onnur herd tiltøk fyri at minka um smittuspreiðingina, kunnu tær samfelagsligu avleiðingarnar verða munandi. Í slíkum førum kann grunnurin verða neiliga ávirkaður. Myndugleikarnir hava fyrireikað og sett í verk fíggjarlig tiltøk fyri at stuðla undir virkjum í Føroyum. Hesi tiltøk kunnu sum frá líður gerast enn størri fyri at linka um avleiðingarnar av avmarkingunum. Í roynd og veru er ikki møguligt at gera nakra fíggjarliga meting av teimum búskaparligu avleiðingunum á felagið av COVID19 í løtuni.

Síðani roknskaparárslok er annars einki hent, sum kann hava týðandi ávirkan á fíggjarligu støðu grunnsins.

| | 2019<br>kr. | 2018<br>tkr. |
|---|---|---|
| **2 Nettoinntøka** | | |
| Eftirlønargjald, løntakarar | 321.461.731 | 255.940 |
| Eftirlønargjald, arbeiðsgevarar | 303.239.243 | 236.989 |
| **Nettosøla til samans** | **627.700.974** | **492.929** |

| | | |
|---|---|---|
| **3 Samsýningar** | | |
| Nevndarsamsýningar | 260.759 | 221 |
| Onnur gjøld tengd at samsýning | 5.191 | 5 |
| | **265.950** | **226** |
| | | |
| Starvsfólkatal í miðal | 0 | 0 |

| | | |
|---|---|---|
| **4 Fíggjarligar inntøkur** | | |
| Avkast, lánsbrøv | 21.516.407 | 1.984 |
| Avkast, partabrøv | 91.839.071 | -21.597 |
| Rentur, peningastovnar | -107.364 | 168 |
| Rentur, áogn frá sølu | 246.002 | 254 |
| Røkt | 40.819 | 151 |
| | **113.534.935** | **-19.376** |

## 5 Virðisbrøv

| | | |
|---|---|---|
| Partabrøv | 384.181.855 | 263.152 |
| Lánsbrøv | 960.150.772 | 890.086 |
| Alternativar íløgur | 91.841.996 | 78.243 |
| | **1.436.174.623** | **1.231.481** |

## 6 Eginogn

| | Fluttur vinningur | Til samans |
|---|---|---|
| Salda 1. januar 2019 | 1.409.438.556 | 1.409.438.556 |
| Ársúrslit | 165.650.005 | 165.650.005 |
| **Eginogn** | **1.575.088.561** | **1.575.088.561** |

## 7 Eventualskyldur v.m.

Grunnurin hevur við árslok móttikið kæru fyri undantak at rinda AMEG-gjøld, tí sosial gjøld vera goldin aðrastaðni í tráð við Nordisk konventión frá 1. januar 2019. Ivamál er um Nordisk konventión kemur fram um nationala lóggávu, og tí kann henda, at Grunnurin skal endurrinda AMEG-gjøld aftur í tíð.

Annar almennur stovnur er í ferð við at fyrireika eitt rættarmál fyri líknandi støðu, so rætturin kann avgera, um tað er konventión ella national lóggáva, ið er galdandi. Grunnurin bíðar tí eftir avkláring av hesum rættarmáli áðrenn støða verður tikin til avleiðingarnar av kæru.

## 8 Veðsetingar og trygdarveitingar

Ongar ognir hjá grunninum eru veðsettar, og ongar trygdir eru veittar.